*Leiðreglur fyri markamót og viðlíkahaldsbýtið millum Landsverk og landsins stovnar*



*Tórshavn tann 06.06..2022, útgáva 8*

## *Innihaldsyvirlit:*


Endamál/staðfesting ........................................................................................................3

I. Eigaraviðurskifti/ábyrgd ........................................................................................................3

II. Umsjón/húsavørður ........................................................................................................3

III. Reingerð ........................................................................................................3

IV. Skipaðar tænastuavtalur ........................................................................................................3

V. Myndugleikakrøv og trygd ........................................................................................................3

VI. Umbygging-, útbygging- og tillaging av landsins bygningum ........................................................................................................3

VII. Bygningsviðlíkahald ........................................................................................................3

VIII. Trygging av landsogn ........................................................................................................3

1.0 Uttandura økir ........................................................................................................4

2.0 Atkomuviðurskiftir ........................................................................................................4

3.0 Fundamentir ........................................................................................................4

4.0 Útveggir útsíða ........................................................................................................4

5.0 Innandura ........................................................................................................5

6.0 Tekja ........................................................................................................5

7.0 Skorsteinar ........................................................................................................5

8.0 Takrennur v.m. ........................................................................................................5

9.0 Vindeygu og úthurðar ........................................................................................................5

10.0 Uttandura lutir ........................................................................................................6

11.0 Kloakk ........................................................................................................6

12.0 Hiti, vatn og sanitet (*) ........................................................................................................6

13.0 Ventilatión / inniluft ........................................................................................................7

14.0 Brunaviðurskiftir ........................................................................................................7

15.0 EL ........................................................................................................7

16.0 Ymiskt ........................................................................................................7

Rundskriv um tryggingarviðurskifti landsins ........................................................................................................8

# Endamál/staðfesting

**Endamálið við hesi vegleiðing er at geva ráðum og stovnum eitt yvirlit yvir, hvørjar skyldur Landsverk og brúkarin hava í sambandi við bygningar hjá landinum:**

I. Eigaraviðurskifti/ábyrgd
   A. Bygningur, har landið er tinglýstur eigari, er ogn landsins.
   B. Eigaraviðurskifti, sum ikki eru "***tinglýst***" ogn landsins, liggja uttanfyri viðlíkahaldsskylduna hjá Landsverki. Dømi um ognir, sum liggja uttanfyri viðlíkahaldsskylduna hjá Landsverki, eru ognir hjá sjálvsognarstovnum.

II. Umsjón/húsavørður
   A. Brúkarar av bygningum landsins, hava skyldu at fara væl um bygningin og skipa dagliga/árliga røkt av bygningslutunum – bæði inni og úti við eini húsavarðafunktión.
   B. Varnast stovnurin vandastøður í bygninginum, t.d. leki ella sporar frá leka í konstruktiónini, er umráðandi at boða Landsverki frá hesum beinanvegin.

III. Reingerð
   A Fyri at tryggja eitt heilsugott inniklima, skal bygningurin reingerðast dagliga, umframt høvuðsreingerð. Skipað útlufting má eisini standa mát við bygningsnýtsluna.

IV. Skipaðar tænastuavtalur
   A. Brúkarin skal hava fastar tænastuavtalur í mun til tekniskar installatiónir, sum **hitaskipan, ventilatiónsskipan, brunaskipan, skorstein, lyftur v.m**.

V. Myndugleikakrøv og trygd
   A. Leiðslan á stovninum hevur skyldug at tryggja, at starvsfólk og borgarar eru í tryggum umhvørvi, og at bygningurin lýkur galdandi myndugleikakrøv.
   B. Verður nýtslan á stovninum broytt, hevur stovnurin skyldug til at boða myndugleikunum og Landsverki frá. Soleiðis at stovnurin útvegar sær dagført skrivligt nýtsluloyvi til galdandi endamál.

VI. Umbygging-, útbygging- og tillaging av landsins bygningum
   A. Leiðslan á stovninum hevur ábyrgd av at fáa fígging til vega, skal landsognin broytast ella tillagast. Bygningsátøk skulu góðkennast av Landsverk **áðrenn** bygningsarbeiðið og bygningsbroytingar verða settar í verk.
   B. Landsverk kann eisini veita ráðgeving og standa fyri arbeiðum, hevur stovnurin játtan til tess.

VII. Bygningsviðlíkahald
   A. Á hvørjum árið raðfestur Landsverk viðlíkahaldstørvin av landsins bygningum, saman við stovninum. Landsverk samstarvar síðani við stjórnarráðini um hesar raðfestingar.
   B. Arbeiðir, sum brúkarin/stovnurin sjálvur setir í verk og sum Landsverk ætlandi skal gjalda fyri, krevst ein skrivlig avtala við Landsverk.

VIII. Trygging av landsogn, t.d. bygningar
   **A.** Brúkarin/stovnurin teknar bygningstrygging v.m. hjá tryggingarfelag. Víst verður til ***Rundskriv um tryggingarviðurskifti landsins* – *pkt. 3.4 í rundskrivinum, um bygningstrygging***.
   ***B.*** Ábyrgdin at endurbyggja/umvæla tryggingarskaða liggur hjá brúkaranum/stovninum. Brúkarin/Stovnurin veitir eisini fígging at endurbyggja tryggingar skaðan - ***sí eisini pkt 5.0 í rundskrivinum um fígging.***

| Økir/bygningslutir | Landsverk | Stovnar |
|---|---|---|

## 1.0 Uttandura økir

| | | |
|---|---|---|
| 1.1 Røkt av atkomu og gonguteigum, í samband við trygd | | X |
| 1.2 Belegningur í sambandi við trygd (*) | X | |
| 1.3 Smærri ábøtur við skervi og asfalti – fríðkan | | X |
| 1.4 Lúka vøkstur v.m. (*) | | X |
| 1.5 Røkja grøn økir | | X |
| 1.6 Røkt av terassu, altan | | X |

### Viðmerkingar

**1.2** Er tørvur á, at belegningur t.d. asfalt verður lagt út, fyri at betra um trygdina, er hetta arbeiði, ið Landsverk tekur sær av. Harafturat kemur merking av P-básum v.m. Talan er her um smærri átøk. Størri átøk krevja, at stovnurin hevur eina játtan til hesi arbeiði.
**1.4** Her skal dentur leggjast á, at m.a. asfalt og skervur skal røkjast. At vøkstur og líknandi ikki gera skaða á belegning og gonguøkir.

## 2.0 Atkomuviðurskiftir

| | | |
|---|---|---|
| 2.1 Skifta úthurð og skráar (rampa) tá tað er útlivað | X | |
| 2.2 Røkt av úthurðum og skráum (rampa) (*) | | X |
| 2.3 Nýggja lyft og størri umvæling (tá lyftin er útlivað) | X | |
| 2.4 Røkt av lyftum (*) | | X |

### Viðmerkingar

**2.2** Stovnurin hevur ábyrgd av, at skráar og úthurðar/rýmingarleiðir verða hildnar viðlíka.

**2.4** Stovnurin hevur ábyrgd av at røkja lyftur. Harafturat hevur stovnurin ábyrgd av, at tey kravdu eftirlitini verða hildin og framd.

## 3.0 Fundamentir

| | | |
|---|---|---|
| 3.1 Umvælingar | X | |
| 3.2 Máling og viðlíkahald | X | |

## 4.0 Útveggir útsíða

| | | |
|---|---|---|
| 4.1 Umvælingar | X | |
| 4.2 Máling og viðlíkahald | X | |

| Økir/bygningslutir | Landsverk | Stovnar |
|---|---|---|

## 5.0 Innandura

| | | |
|---|---|---|
| 5.1 Umvæling (*) | | X |
| 5.2 Máling á yvirflatar | | X |
| 5.3 Broyting á verandi konstruktión(*) | | X |
| 5.4 Broyting á verandi konstruktión (myndugleikakrøv) | X | |
| 5.5 Skifta bygningslut (útlivað) | X | |

### Viðmerkingar

**5.1** Stovnar hava ábyrgd av at umvæla allar skaðar innandura, orsakað av brúki og brúkaraatburði.

**5.3** Broyting av innrættan, flytan av veggjum og útbygging eru ikki fevnd av viðlíkahaldsjáttanini, og eru tí ábyrgd hjá stovni og ikki Landsverki. Tó skal Landsverk góðkenna allar broytingar áðrenn tær verða framdar. *Sí punkt* ***VI***

## 6.0 Tekja

| | | |
|---|---|---|
| 6.1 Nýggja tekju, størri umvæling og viðlíkahald | X | |
| 6.2 Tekja, røkt | | X |

## 7.0 Skorsteinar

| | | |
|---|---|---|
| 7.1 Neyðugt eftirlit við skorsteinum v.m.(*) | | X |
| 7.2 Skifta skorsteinar ella størri umvælingar | X | |

### Viðmerkingar

7.1 Stovnar hava ábyrgd av at hava eitt skipað eftirlit við skorsteinunum. Ein skorsteinur, sum er tiptur, ella sum sjáldan verður sópaður, kann vera vandamikil og føra til bæði eitran og eldsbruna.
Av heilsu- og trygdarávum eigur stovnurin at hava tænastuveitara, sum tryggjar at skorsteinurin verður sópaður í minsta lagi eina ferð um árið.

## 8.0 Takrennur v.m.

| | | |
|---|---|---|
| 8.1 Røkja og reinsa takrennuna eftir tørvi, ella **í minst lagið einaferð árliga** | | X |
| 8.2 Røkja og reinsa takrennubrunnar | | X |
| 8.3 Umvæla/skifta takrennur og takrennubrunnar | X | |

## 9.0 Vindeygu og úthurðar

| | | |
|---|---|---|
| 09.1 Røkt/skifta hongsl, besløg, listar, pumpur v.m. | | X |
| 09.2 Mála vindeygu og úthurðar innan | | X |
| 09.3 Mála vindeygu og úthurðar uttan | X | |
| 09.4 Skifta vindeygu og úthurðar (útlivað) | X | |
| 09.5 Punkteraðar rútar(*) | X | |

### Viðmerkingar

**09.5** Størri glasfasada krevur serjáttan

| Økir/bygningslutir | Landsverk | Stovnur |
|---|---|---|

## 10.0 Uttandura lutir

| | | |
|---|---|---|
| 10.1 Røkja uttandura ljós | | X |
| 10.2 Røkja uttandura skelti | | X |
| 10.3 Skifta uttandura ljós | X | |
| 10.4 Festi uttandura, til størri skelti(*) | X | |
| 10.5 Skifta smærri skelti uttandura(*) | | X |

### Viðmerkingar

**10.4** Festi " til størri skelti" fest í lendið, hevur Landsverk ábyrgd av at skifta. Sí tekning niðanfyri.

**10.5** Smærri festi, skelti og áskrift, hava stovnar ábyrgdina av. Sí tekning niðanfyri.




## 11.0 Kloakk

| | | |
|---|---|---|
| 11.1 Røkja og reinsa kloakk leiðingar/brunnar/pumpuskipanir | | X |
| 11.2 Størri umvælingar | X | |

## 12.0 Hiti, vatn og sanitet (*)

| | | |
|---|---|---|
| 12.1 Røkja frárenning | | X |
| 12.2 Skifta útlivaða frárenning | X | |
| 12.3 Røkja/skifta kummur, hondvøsk, brúsur | | X |
| 12.4 Røkja/skifta húsbúna á vesi | | X |
| 12.5 Røkja/skifta radiatorar, termostatar v.m. | | X |
| 12.6 Skifta útlivaðar radiatorar v.m. | X | |
| 12.7 Røkja/skifta vatnkranar, vøsk v.m. | | X |
| 12.8 Skifta útlivaða oljufýr, hitaketil og oljutanga v.m. | X | |
| 12.9 Skifta størri útlivaðar hitapumpur | X | |
| 12.10 Røkt og viðlíkahald av hitaskipan. | | X |

### Viðmerking

**12.0** sí punkt **IV**

| Økir/bygningslutir | Landsverk | Stovnur |
|---|---|---|

## 13.0 Ventilatión / inniluft

| | | |
|---|---|---|
| 13.1 Røkt av ventilatiónsanleggum – skifta filtur o.a. | | X |
| 13.2 Størri broyting av ventilatiónsanleggum | X | |
| 13.3 Luft- og soppakanningar | | X |
| 13.4 Høvuðsreingerð ísv. staðfesting av soppi | | X |

## 14.0 Brunaviðurskiftir

| | | |
|---|---|---|
| 14.1 Røkt av ABA, AVS og ABDL (*) | | X |
| 14.2 Røkt av sløkkiútbúnaði (*) | | X |
| 14.3 Skifta útlivað ABA, AVS, ABDL | X | |
| 14.4 Keyp og rakstur av sløkkiútbúnaði | | X |
| 14.5 Røkt og viðlíkahald av brandhurðum og hurðapumpum | | X |
| 14.6 Broyting og skiftan av brandhurðum og hurðapumpum | X | |

### Viðmerkingar

**14.1** ABA (Automatisk brandalarmanlegg) Við beinleiðis samband til sløkkiliðið.
AVS (Automatisk sprinklaraanlegg).
ABDL (Automatisk brandhurða afturlatingarskipan).
**14.2** Her er hugsað um hondhildnar eldsløkkjarar, brandteppir, fyrstuhjálparkassar o.l..

## 15.0 EL

| | | |
|---|---|---|
| 15.1 Røkt og viðlíkahald av vanligum EL-útbúnaði | | X |
| 15.2 Skifta vanligan el-útbúnað, ljóskeldur o.l. | | X |
| 15.3 Hvítvørur - nýkeyp og allar umvælingar | | X |
| 15.4 Skifta útlivaða el-innleggingum og talvum | X | |
| 15.5 Røkt og eftirlit av CTS-skipanum (*) | | X |
| 15.6 Skifta útlivaða CTS-skipan | X | |

### Viðmerkingar

15.5 CTS (Central Tilstandskontrol og styring) verður nýtt til at stýra hita -og ventilatiónsskipanini.

## 16.0 Ymiskt

| | | |
|---|---|---|
| 16.1 Røkt og viðlíkahald av lyklum og lásaskipan | | X |
| 16.2 Skifta útlivaða lásaskipan, ikki einstøk lás | X | |
| 16.3 Røkt og viðlíkahald av køkum | | X |
| 16.4 Skifta útlivaðan køk | X | |
| 16.5 Skifta køk (fríðkandi) | | X |
| 16.6 Øll reingerð | | X |

Rundskriv um tryggingarviðurskifti landsins, kann takast niður **her**

Journal nr: 6060-0007/2002 \ 107

# Rundskriv
# um
# tryggingarviðurskifti landsins

## 1. Inngangur

Tørvurin hjá tryggingartakara at tekna tryggingar hjá tryggingarfelag er tengdur at fíggjarliga týdninginum av váðanum. Tørvurin at tekna tryggingar minkar tí so hvørt fíggjarligi týdningurin av váðanum gerst minni.

Dagligar hendingar hava lítlan fíggjarligan týdning fyri landið, og fíggjarligi váðin skal vera rættiliga stórur, áðrenn hann fær týdning fyri landskassan. Tørvurin hjá landinum at tekna tryggingar hjá tryggingarfelag er tí rættiliga avmarkaður.

Út frá hesum verður í hesum rundskrivi staðfest, at landið nú átekur sær nógv størri váða enn áðrenn tað vóru nakrar reglur galdandi viðvíkjandi tryggingarviðurskiftum landsins.

Rundskrivið ásetur, hvat virksemi hjá landinum er umfatað av rundskrivinum (punkt 2), hvørjar tryggingar verða teknaðar hjá tryggingarfelag (punkt 3), at hvør einstakur stovnsleiðari hevur ábyrgdina av, at hesar tryggingar verða bodnar út millum føroysku tryggingarfeløgini (punkt 4), hvussu endurgjald verður veitt í sambandi við skaða, har landið hevur átikið sær allan váðan (punkt 5) og at mannagongdin í sambandi við fráboðan av arbeiðsskaðum er óbroytt, hóast landið nú átekur sær allan váðan (punkt 6).

## 2. Endamál og vavið á rundskrivinum

Rundskrivið ásetur tryggingarreglur fyri alt virksemi, sum kemur undir játtanarsløgini, rakstrar-játtan, løgujáttan og landsfyritøka í játtanarskipan landsins.

## 3. Tryggingar, ið verða teknaðar hjá tryggingarfelag

***3.1. Er tað ásett í lóggávu, verða tryggingar teknaðar***

Í nøkrum førum er ásett í lóg, at trygging skal teknast hjá tryggingarfelag. Eitt dømi um hetta er § 55 í ferðslulógini, har tað er ásett, at tann, sum eigur ella persónur (ánari), sum varandi hevur ræði á motordrivnum akfari, skal seta seg fyri og halda í gildi trygging í ábyrgdartryggingarfelag, góð-kendum av Føroya landsstýri.

Í teimum førum har tað er ásett í lóg, at trygging skal teknast hjá tryggingarfelag, verður hetta gjørt.

***3.2. Altjóða ferðatryggingar verða teknaðar***

Tað hevur týdning, at starvsfólk, ið eru í arbeiðsørindum uttanlands, eru tryggjað ímóti óhappi og vanlukkum við trygging, sum er altjóða viðurkend og verður góðtikin allastaðni.

Tí verða altjóða standard ferðatryggingar teknaðar hjá tryggingarfelag, ið veitir hesar tryggingar. Slíkar tryggingar eru altjóða viðurkendar, og starvsfólk skal tí bara hava eitt kort við sær, ið skal vísast fram, um óhapp hendir.

Ferðatryggingar skulu teknast sum ársferðatryggingar og ikki sum einstaklinga ferðatryggingar.

Hetta gevur fylgjandi fyrimunir:

- Tryggingargjaldið er vanliga lægri fyri ársferðatrygging enn fyri einstaklinga ferðatrygging.
- Trygd er fyri, at starvsfólk altíð eru tryggjað við ferðatrygging tá ið tey ferðast uttanlands, tí við ársferðatrygging skal stovnurin ikki minnast til at tekna trygging, hvørja einstøku ferð starvsfólk ferðast uttanlands.
- Umsitingin hjá stovninum av ársferðatryggingini er minni, tí ein meting verður gjørd av ferðadøgunum, tá ið ársferðatryggingin verður teknað. Metingin verður síðan regulerað eina ferð um árið, í sambandi við at ársferðatryggingin verður endurnýggjað.
- Hvør stovnur hevur nøkur ársferðatryggingarkort, sum ikki eru skrásett við navni, og tí kunnu latast tí ella teimum starvsfólkum, sum skulu ferðast uttanlands.

Ferðatryggingarnar skulu veita fulnað fyri hendingum, sum vanligar standard ferðatryggingar umfata, t.d. veita fulnað fyri útreiðslum til læknahjálp, innlegging á sjúkrahús, flutning heim í sambandi við sjúku, skaða ella deyða, boðsending av avvarðandi til útlond, heimferð í sambandi við sjúku ella deyða hjá næstu avvarðandi, álop, vanlukkutilburð, ábyrgd og viðføri.

### *3.3. Tryggingar í sambandi við leigu-, byggi- og arbeiðssáttmálar*
Í sambandi við leigusáttmálar kann tað í ávísum førum verða kravt, at trygging verður teknað hjá tryggingarfelag. Talan er serliga um sáttmálar yvir stytri tíð við útlendsk feløg, har krøvini um, at tryggingar skulu teknast hjá tryggingarfelag, eru standard í sáttmálunum.

Hetta kann eisini vera krav í sambandi við byggi- og arbeiðssáttmálar. Slíkar byggi- ella arbeiðstøkutryggingar verða teknaðar við lutfalsliga stórari sjálvsábyrgd, sum annaðhvørt er 0,5 mió. kr. ella 1 mió. kr.

Er byggikostnaðurin undir 10 mió. kr. er sjálvsábyrgdin 0,5 mió. kr.

Er byggikostnaðurin yvir 10 mió. kr. er sjálvsábyrgdin 1 mió. kr.

### *3.4. Trygging av bygningum*
Bygningar hjá landinum verða bert tryggjaðir ímóti stórskaða. Tryggingarsáttmálarnir verða tí lagdir soleiðis tilrættis, at bygningar bert eru tryggjaðir ímóti:

- Eldsbruna.
- Øðrum bygningsskaða.

Tryggingarsáttmálarnir viðvíkjandi bygningum skulu tí ikki umfata:

- Glas- og kummuskaðar.
- Rørskaðar (vatnskaðar av tærdum rørum).
- Restvirði (restvirðisfulnaðurin hevur við sær, at nýtiligar restir verða tiknar niður og nýtt verður bygt, ístaðin fyri at endurnýta bygningsrestirnar, sum ikki hava fingið skaða).
- Tap í sambandi við hølisleigu (tryggingarfulnað fyri leiguútreiðslur av øðrum hølum ella mistar leiguinntøkur eftir skaða).

- Uppruddingarútreiðslur (tryggingarfulnað fyri útreiðslur til upprudding á skaðastaðnum).
- Útreiðslur av at fáa bygning góðkendan (tryggingarfulnað fyri útreiðslur í sambandi við broytingar av bygningi, sum byggimyndugleikin setur).
- Líknandi útreiðslur, sum hava lítlan fíggjarligan týdning fyri landið.

Sjálvsábyrgdin fyri bygningar verður annaðhvørt 0,5 mió. kr. ella 1 mió. kr.

Fyri bygningar, sum hava eitt nývirði undir 10 mió. kr. verður bygningstryggingin teknað við 0,5 mió. kr. í sjálvsábyrgd. Hetta hevur við sær, at prosentvísa sjálvsábyrgdin av nývirðinum á bygningum verður soljóðandi:

| Virðið á bygningi í kr. | Sjálvsábyrgd í kr. | Sjálvsábyrgd í % av nývirði |
|---|---|---|
| 1.000.000 | 500.000 | 50,0 |
| 2.000.000 | 500.000 | 25,0 |
| 3.000.000 | 500.000 | 16,6 |
| 4.000.000 | 500.000 | 12,5 |
| 5.000.000 | 500.000 | 10,0 |
| 6.000.000 | 500.000 | 8,3 |
| 7.000.000 | 500.000 | 7,1 |
| 8.000.000 | 500.000 | 6,3 |
| 9.000.000 | 500.000 | 5,6 |
| 9.990.000 | 500.000 | 5,0 |

Fyri bygningar, sum hava eitt nývirði yvir 10 mió. kr. verður bygningstryggingin teknað við 1 mió. kr. í sjálvsábyrgd. Hetta hevur við sær, at prosentvísa sjálvsábyrgdin av nývirðinum á bygningum verður soljóðandi:

| Virðið á bygningi í kr. | Sjálvsábyrgd í kr. | Sjálvsábyrgd í % av nývirði |
|---|---|---|
| 10.000.000 | 1.000.000 | 10,0 |
| 20.000.000 | 1.000.000 | 5,0 |
| 30.000.000 | 1.000.000 | 3,3 |
| 40.000.000 | 1.000.000 | 2,5 |
| 50.000.000 | 1.000.000 | 2,0 |
| 100.000.000 | 1.000.000 | 1,0 |

Legg til merkis, at bygningarnir verða tryggjaðir til nývirði. Tað verður tí viðkomandi tryggingarfelag, sum ger eina meting av nývirðinum á bygninginum og setir tryggingargjaldið eftir hesum. Viðkomandi tryggingarfelag hevur tí eisini ábyrgdina av, um tryggingarvirðið er ov lágt sett. Undirtrygging verður tí ikki gjørd galdandi.

Við hesum tryggingarreglum fyri bygningar verður tryggingargjaldið væl lægri, tí vanligir og lutfalsliga smærri skaðar fyri landið verða ikki tryggjaðir hjá tryggingarfelag.

Í sambandi við størri skaðar koma tryggingarfeløg inn í myndina við at veita tryggingarfulnað fyri fíggjarliga tunga partin av skaðanum og øðrum tænastum, sum tryggingarfeløg veita, t.d. skaðafyribyrging og fyribyrgjandi tænastum á skaðastaðnum.

Hetta hevur við sær, at landið er tryggjað ímóti stórum fíggjarligum tapi í sambandi við størri stormskaðar, eldsbrunar ella aðrar stórar skaðar, har fleiri bygningar kunnu verða raktir samstundis.

***3.5. Trygging av skipum og øðrum stórum ognum***
Trygging av skipum hjá landinum verður eisini løgd soleiðis tilrættis, at skipini bert eru tryggjað ímóti stórskaða hjá tryggingarfelag.

Váðin fyri at stórskaði hendir á skip er væl annarleiðis enn fyri bygningar. Av tí at skipini hjá landinum er spjadd runt um landið og fleiri skip tí sjáldan eru á sama stað samstundis, er vandin lítil fyri, at fleiri skip verða rakt av skaðatilburði samstundis.

Skip verða tí tryggjað hjá tryggingarfelag við 10 mió. kr. í sjálvsábyrgd fyri hvørt skipið.

Tað skal viðmerkjast, at fyri skip yvir 500 bruttoregistartons verður serskild P & I trygging teknað.

Um talan verður um at tekna tryggingar fyri aðrar stórar ognir, verður sjálvsábyrgdin annaðhvørt sum á bygningunum ella á skipunum. Hetta velst um váðamyndin líkist mest bygningum ella skipum.

***3.6. Neyðsendarakfør***
Av tí sannlíkindini fyri at neyðsendarakfør fáa skaða eru fleiri ferðir størri enn fyri onnur akfør, verða neyðsendarakfør skrokktryggjað við sjálvsábyrgd hjá tryggingarfelag til tey eru 3 ára gomul, tá verður skrokktryggingin strikað. Neyðsendarakfør, sum eru meira enn 3 ár, verða tí ikki skrokk-tryggjað hjá tryggingarfelag

***3.7. Annað***
Gera heilt serlig viðurskifti seg galdandi, har tað er eyðsýnt, at skilabesta loysnin er at tekna trygging hjá tryggingarfelag, kann tryggingarsáttmáli verða gjørdur við tryggingarfelag. Slíkar tryggingar skulu góðkennast av Fíggjarmálaráðnum.

**4. Tryggingar, ið verða teknaðar hjá tryggingarfelag, skulu bjóðast út**

Fyri at landskassin skal fáa fyrimun av kappingini á føroyska tryggingarmarknaðinum, skulu tryggingarsáttmálarnir hjá landinum bjóðast út millum føroysku tryggingarfeløgini.

Tryggingarnar skulu bjóðast út sambært ásetingunum í hesum rundskrivi, soleiðis at tilboðini, sum tryggingarfeløgini geva eru undir fullkomuliga somu fortreytum. Tryggingarfeløgini skulu lata til-boðini inn til eina frammanundan ásetta tíð, tá ið tilboðini verða latin upp og tikið verður av lægsta tilboði.

Hvør einstakur stovnsleiðari hevur ábyrgdina av, at ásetingarnar í hesum rundskrivi verða hildnar, herundir at tryggingarnar á viðkomandi stovni, ið ikki fyrr hava verið bodnar út, verða bodnar út millum føroysku tryggingarfeløgini. Hesar tryggingar verða fyrst sagdar upp sambært uppsagnar-freistini í hvørjum einstøkum tryggingarsáttmála og teknaðar aftur hjá tí tryggingarfelag, sum hevur lægsta tilboðið sambært ásetingunum í hesum rundskrivi.

Tá tryggingin er boðin út og tikið er av lægsta tilboði, soleiðis at tryggingin er í samsvari við ásetingarnar í hesum rundskrivi, er ikki neyðugt at bjóða tryggingina út aftur, uttan at tað henda

avgerandi broytingar í tryggingarviðurskiftunum á viðkomandi stovni. Stovnsleiðarin hevur tó skyldu at endurskoða tryggingarviðurskiftini á viðkomandi stovni, um hann metir, at tryggingarútreiðslurnar kunnu gerast biligari.

## 5. Endurgjald har trygging ikki er teknað hjá tryggingarfelag

Tryggingar, ið eru ikki nevndar undir punkt 3, verða ikki teknaðar. Í sambandi við skaða ella óhapp, har trygging er ikki teknað hjá tryggingarfelag, verður endurgjald veitt sambært vanligu játtanarreglunum.

Eru útreiðslur av skaða so mikið stórar, at viðkomandi stovnur megnar ikki at halda útreiðsluna innanfyri sína játtan, verður søkt um eykajáttan.

Hevur málið so mikið stóran skund, at virksemið hjá viðkomandi stovni kann ikki halda fram uttan at endurgjald verður veitt alt fyri eitt, verður málið lagt fyri fíggjarnevndina, sum kann veita eykajáttan sambært reglunum um fíggjarnevndarskjal.

## 6. Málsviðgerð í sambandi við arbeiðsskaðar

Sambært galdandi reglum ásettar í § 17 í *anordning nr. 389 af 15.11.1996 om forsikring mod følger af ulykkestilfælde,* hevur landið ikki skyldu til at lata váðan í sambandi við arbeiðsskaðar til tryggingarfelag. Landið teknar tí ikki longur vanlukkutryggingar ella arbeiðsskaðatryggingar hjá tryggingarfelag, men átekur sær alla váðan.

At landið átekur sær allan váðan, fær onga ávirkan á tryggingarviðurskiftini hjá starvsfólkunum hjá landinum í sambandi við arbeiðsskaðar. Fráboðanin til Vanlukkutryggingarráðið og málsviðgerðin í ráðnum verður tann sama sum higartil. Einasti munur verður, at tað verður landið og ikki tryggingarfelagið, sum fær rokningina frá Vanlukkutryggingarráðnum, tá ið ráðið hevur tikið avgerð um, at landið skal veita endurgjald.

## 7. Gildiskoma

Hetta rundskrivið kemur í staðin fyri tryggingarrundskrivið, sum kom í gildi 1. januar 2003.

Teir stovnar, ið enn hava tryggingarsáttmálar, sum ikki eru í tráð við hetta rundskrivið, skulu fáa síni tryggingarviðurskifti í samsvar við ásetingarnar í hesum rundskrivi, so hvørt verandi tryggingarsáttmálar ganga út.

**Argir 21. november 2003**

**Karsten Hansen**
*landsstýrismaður* / **Petur Alberg Lamhauge**
*fíggjarmálastjóri*